VIÐMERKINGAR

# Musikkskúlin kortini eirdur undan hóttafalli av nýggjum?

**Ólavur Hátún**



Við sáttmálasamráðingum í vár fingu musikkskúlalærararnir ljóð fyri sínum sjálvsøgdu ynskjum um lønarkor samsvarandi teimum, sum útbúnir musikklærarar hava aðrastaðni. Men fyri musikkskúlaskipanina gjørdist hetta ein Pyrrhus-sigur, tí hann kostaði skúlanum ikki færri enn fimm lærarastørv, og eini 200 musikkskúlanæmingar stóðu uttan lærara, av tí at eingin økt fíggjarjáttan til musikkskúlan fylgdi við nýggja sáttmálanum.

Tíbetur hava foreldur at verandi musikkskúlanæmingum og foreldur at teim mongu børnum, sum enn bert hava áralangt útlit í einari bíðirøð, gjørt álvarsligan vørr um hesi vandaviðurskiftir, og nú málið verður reist í løgtinginum, er tað at vóna, at ein loysn er í eygsjón, so musikkskúlin ikki aftur verður fyri lemjandi skerjing, sum hann hevur verið tað fyrr.

Við Royndarmusikkskúlanum byrjandi á heysti 1981 fingu vit eina musikkundirvísing í lag, sum eftir fáum árum breiddi seg so skjótt út um at kalla alt landið, at tá lógarskipaðir musikkskúlar tóku við eftir summarfrí 1985, vóru ikki færri enn 24,5 full musikklærarastørv í skipanini.

Spurdur av landsstýrismanni um, hvussu nógvar lærarar ein fult útbygdur musikkskúli fór at krevja, kundi eg tá leysliga meta, at talan fór at verða um eini 50 - 60 fulltíðarstørv. Týdningarmikil partur av endamáli musikkskúlans er jú, at hann, so væl sum til ber, skal skapa fortreytir fyri einum virknum tónleikalívi úti um alt landið, og tað krevur umfatandi og fjølbroytt undirvísingartilboð. 50-60 musikklærarastørv mundi ljóða av nógvum; men eg kundi tá vísa á, at grannar okkara fyri vestan íslendingar, bert 5-6 ferðir fleiri enn vit í tali, høvdu heili 600 musikklærarar í fulltíðarstarvi.

Áhugin fyri nýggja musikkskúlatiltakinum var støðugt vaksandi, og so mikið varð strongt á eftir lærarum, at komið var upp á 44 full størv, tá ið fíggjarkreppan fór at taka seg upp. Natúrligt var tað, at musikkskúlin tá dvøldi á og eisini tók nøkur fet eftir hæli; men í einum landsstýrisskeiði fyrst í 90-árunum hendi tað vanlukkuliga, at musikkskúlin misti ta politisku vældvild, sum fram til tá hevði givið honum so góðan byr. Hann bleiv skerdur heilt niður til tey bert 25 lærarastørvini, sum hann restina av mínari musikkskúlatíð og ár eftir tað mátti liva við; tí um enn hugburðurin hjá ovastu politisku leiðsluni aftur vendi sær til tað positiva, so vóru í teimum árum ongar atstøður til at fáa kvinkað nøkur fíggjartøl uppeftir aftur.

Sum dømi um fylgjurnar av hesari viðferð kann t.d. nevnast, at Musikkskúlin í Vágum, sum eftir hesum fáu árum hevði skapt eitt Vága Ungdómsorkestur, ið ikki bert gjørdist fyrimyndarligt her í landinum, men eisini vann sær sóma á konsertferðum uttanlands, misti so nógv av sínum tímatali, at orkestrið følnaði niður til at vera lítið meira enn eitt eiti av tí, tað hevði fingið ment seg upp til. Nevnast kann eisini, at Musikkskúlin í Sandoynni, sum við tveimum fulltíðar musikklærarastørvum hevði eina bjarta framtíð fyri sær, misti flogið og mær vitandi ongantíð er komin rættiliga fyri seg aftur eftir døttin.

Eitt triðja dømi: Heitið Klaksvíkar Kamarorkestur var einaferð frammi, og við tí vøkstri, sum tá var, har tað eina tíð búðu bæði cello- og kontrabasslærari í norðurøki musikkskúlans, vóru góð útlit fyri einum kamarorkestri í samarbeiði millum Klaksvík og Eysturoynna. Men við tí skilaleysa veruleika, at musikkskúlaskipanin nú í meira enn 10 ár bert hevur kunnað hýst tí eina cellolæraranum, sum umframt sítt virki í høvuðsstaðnum eisini hevur verið noyddur at ferðast bæði til Vestmannar, inn í Eysturoynna og til Klaksvíkar, eru ongir møguleikar fyri slíkum orkesturvirksemi, sum strúkaraundirvísingin annars skuldi miðað ímóti.

Hesi dømi burtur úr fleiri verða her borin fram fyri at gera myndugleikum og politikarum greitt, at tað ikki bara snýr seg um livibreyðið hjá fimm musikklærarum og mistar møguleikar hjá 200 næmingum, men at musikkskúlin, hesin einaferð so vónríki vøkstur í okkara mentanarlívi, í veruleikanum bert hevur ligið í hálvum gekki í øll hesi nevndu mongu ár og tí í alt ov lítlan mun er sloppin at seta í verk tær hugsjónir og teir møguleikar, sum hann ber í sær, og sum hann var ætlaður til. Tað verður tí eitt harmilig afturstig fyri okkara tónleikalív, um hann nú aftur skal verða fyri skerjandi smeiti, nú hann endiliga er við at fáa føturnar fyri seg av nýggjum.

---

*Framhald av síðu 11*

**Ósannindi.**
Hetta er eisini ósatt. Øssur hevur verið fyrimyndarligur at arbeiða saman við. Hetta sæst kanska best av, at starvsfólkini við Áir hava støðast. Av teimum, sum arbeiða í føstum starvi, hava trý arbeitt á skúlanum í 18 ár, ein í 9 ár og ein í 5 ár.

Hinvegin kundi nevndin spurt seg sjálva, hvussu tað ber til, at verkstaðurin í Smiðjugerði, sum bert hevur virkað í tvey ár, longu hevur mist helvtina av sínum starvsfólki.

**Hvat er revalidering?**
Stovnurin Alv hevur øll árini havt til endamáls at revalidera fólk. Revalidering merkir, at vit við at geva einum fólki skúlagongd ella læru hava gjørt tey før fyri at klára seg á jøvnum føti við onnur á arbeiðsmarknaðinum. Fyri at náa hesum máli hevur skúlin bert givið undirvísing, men ikki havt egnar próvtøkur. Próvtøkukrøvini eru tey somu sum hjá Føroya Handilsskúla. Føroya Handilsskúli gevur handilsnæmingunum FHS-prógv. Næmingar, ið taka 9. floks prógv, fara til próvtøku á Felagsskúlanum á Oyrarbakka. Tað at næmingarnir á Alv-skúlanum hava eina formliga góðkenda útbúgving gevur einum framtíðar arbeiðsgevara trygd fyri, at næmingarnir duga tað sama sum á øðrum skúlum. Hetta er ein høvuðsorsøk til at heili 70 % av næmingunum koma í arbeiði eftir at hava verið í skúla við Áir.

Nýggja fyristøðukvinnan forðar fólki í at verða revalidera.

Hesa mannagongd hevur nýggja fyristøðukvinnan broytt. Hon skipar fyri egnum skeiðum. Fólk ganga á hesi skeið, men fáa einki góðkent prógv, tá undirvísingin endar. Av tí sama er enn eingin revalideraður av skeiðinum, sum nýggja fyristøðukvinnan hevur staðið fyri. Eitt skeið, sum hon hevði skipað fyri, byrjaði fyrst í januar í ár í Runavík, men hetta skeiðið fekk ikki nóg nógvar næmingar. Hon ringdi tá til Alv-skúlan og bað næmingar, sum gingu í skúla har, um heldur at koma á skeiðið, sum hon hevði skipað fyri. Hesir næmingar hava ikki fingið nakað góðkent prógv, tí skúlin er ikki góðkendur. Tey hava bert fingið eina váttan, at tey hava tikið lut í einum skeiði. Hetta stillar tey munandi verri fyri, tá tey skulu út á arbeiðsmarknaðin. Ein næmingur, sum hevði kunnað tikið 9. floks prógv við Áir, og síðan tikið FHS-prógv komandi skúlaár, stendur nú við eini váttan, sum ikki kann brúkast nakrastaðni.

Nýggja fyristøðukvinnan vísir við sínum gerðum, at henni vantar virðing fyri formliga góðkendum útbúgvingum.

**Øssur og hini starvsfólkini hava røkt síni størv fyrimyndarliga.**
Øssur hevur nú í umleið 25 ár fyrimyndarliga røkt sítt starv sum undirvísingarleiðari á einum endurbúgvingarstovni og ígjøgnum hesi árini hjálpt millum 250 og 300 brekaðum fólkum útaftur í vinnulívið. Aðrastaðni hevði hann fingið heiðursmerki fyri sítt arbeið fyri brekað.

Eg fekk virðing fyri Øssuri, tá hann, sum ikki sjálvur var brekaður, kortini vísti so stóran áhuga fyri lagnuni hjá brekaðum og dugdi at síggja evnini í næmingunum. Hitt sama kann sigast um Emmu Zachariasen, Mariu av Steinum og Brand Petersen, sum nú í nógv ár við lív og sál hava gingið høgt uppí teirra arbeið á skúlanum.

Nýggja fyristøðukvinnan, sum ikki er lærari, hevur frá fyrsta degi vanvirt teirra arbeiði sum lærarar og ta orku tey hava lagt í skúlan við Áir. Nevndin hevur stuðlað henni í hesum og hevur ongantíð lagt í ella megnað at tálma tað niðurbrótandi orðalagið og gerðirnar hjá fyristøðukvinnuni mótvegis starvsfólkunum við Áir.

**Verða nøkur starvsfólk eftir á skúlanum, um Øssur verður uppsagdur?**
Nevndarformaðurin Doris Hansen sigur í Dimmalætting 14.juli, at skúlin heldur fram óbroyttur komandi ár, og at eingin hevur sagt seg úr starvi.

Starvfólkini á skúlanum hava longu verið hjá landsstýrismanninum og sagt frá, at tey fara úr starvi, um Øssur verður uppsagdur. Tey vita, at talan er um eina ógrundaða uppsøgn. Sjálvandi fara tey ikki at siga upp, uttan at Øssur fyrst er farin úr starvi, og sjálvandi siga tey ikki upp, fyrr enn tey hava annað starv at fara í. Doris Hansen vísir at hon ikki tekur starvsfólkini fyri fult, og harvið vanvirðir hon tey enn einaferð.

Føroya Lærarafelag er fullgreitt um ta órættvísu viðferð Øssur hevur fingið, og hevur tí avgjørt at blokera leiðarastarvið við Áir, um so er, at nevndin lýsir starvið leyst. Eisini hetta velur Doris at ignorera.

**Ein virðilig loysn?**
Niðurstøðan er, at nevndin við at siga Øssuri upp, hevur framt justitsmorð. Hinvegin má tað ásannast, at samstarvið millum nýggju fyristøðukvinnuna øðrumegin og Øssur og starvsfólkini við Áir hinumegin, hevur gingið illa. Men tað er skeivt at geva Øssuri skyldina fyri hetta.

Tað eru helst fleiri mátar at greiða torføru støðuna uppá. Ein máti, ið hevði víst virðing fyri báðum pørtum, kundi verið, at Alv-skúlin varð fluttur frá sjálvsognarstovninum Alv og Almannamálaráðnum til Mentamálaráðið, soleiðis sum ætlanin hevur verið seinastu árini. Skúlin hevði á henda hátt komið í eitt skúlafakliga meira hóskandi umhvørvi og undir eftirlit, sum er meira áhugað í undirvísingarvirkseminum hjá Alv. So kunnu Alv og Almannamálaráðið halda áfram við varda verkstaðnum í Smiðjugerði, so frægasta úrslitið fæst har.

---

## Jóannes Eidesgaard í Grasagarði

**Niels Uni Dam**
*Vættrastígur 6, kj.*
*FO-100 Tórshavn*



Tað frøddi meg almikið at hoyra røðuna, sum løgmaður helt í Grasagarði ólavsøkuaftan. Røðan vísti dirvi og vit. Mín virðing fyri bæði Jóanesi Eidesgaard og løgmans-embætinum vaks. Almennu Føroyar sendu ein kláran boðskap, at Føroyar eru fyri allar føroyingar, og at tolsemi og andsfrælsi skulu ráða.

At Jenis av Rana, sum umboðar ein andaliga víðgongdan minniluta, finnist at løgmanni, vísir bert hvussu beinrakin røðan var. Jenis má ikki gloyma at tolsemi gongur báðar vegir. Vit sum hoyra til meirilutan av føroyingum, vísa tolsemi yvir fyri Jenis, hann hevur andsfrælsi, og tað skal hann hava. Men neyðugt er at eisini hann vísur tolsemi yvir fyri øðrum.

Tað var júst hetta sum løgmaður umrøddi; skulu Føroyar vaksa sum tjóð, eiga vit at hava virðing yvir fyri hvør øðrum.

Takk fyri røðuna løgmaður. Sjálvt um eg ikki havi valt teg, ella nakran í tínum parlamentariska grundarlagi, so gjørdist tú eisini mín løgmaður í Grasagarði.

---



# Fiskurin sleppur ikki at gerast gamal

**– Vit geva okkara ráð, og so er tað upp til myndugleikarnar at taka ráðini til eftirtektar – ella at vraka tey. Veiðitrýstið er eftir okkara tykki ov stórt, og vit halda, at tað fær avleiðingar fyri fiskiskapin undir Føroyum, at politiski myndugleikin ikki vil taka neyðugu stigini, sigur Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni**

FISKIDAGAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– Talið av stórum fiski í havinum er sjálvsagt minni enn av smáum fiski, og tá ið trýstið er ov stórt, minkar talið av tí størra fiskinum uppaftur meira, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, hevur lagt uppskot fyri tingið um fiskidagar fyri komandi fiskiár, sum byrjar 1. september.

Í høvuðsheitum mælir landsstýrið til, at fiskidagarnir á landgrunninum verða skerdir við 1,5% yvir ein kamb. Í uppskotinum verður Føroyabanki kortini undantikin; har skulu fiskidagarnir skerjast við 10%, samstundis sum bankin skal friðast í gýtingartíðini. Aftrat hesum ætlar landsstýrismaðurin at skerja hjá veiðina hjá lemmatrolarunum á innaru leiðunum. Tó verður í uppskotinum einki sagt um, hvussu stór henda skerjing skal verða.

Uppskotið hjá landsstýrismanninum er als ikki í tráð við tilmælini hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum mælti til nógv størri skerjingar av veiðitrýstinum.

## Avleiðingar

– Vit gera okkara tilmæli til landsstýrismannin, og síðan er tað upp til politisku myngugleikarar at taka ráðini til eftirtektar – ella at vraka tey. Soleiðis er skipanin, og soleiðis eigur tað at vera. Politikararnir kunnu fylgja okkara ráðum ella vraka tey. Okkara ráð eru ikki fylgd, nú landsstýrismaðurin skjýtir upp, at fiskidagarnir á landgrunninum bert verða skerdir við 1,5%, og skerjingin á Føroyabanka ætlandi verður 10%.

Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, sigur, at hann hvørki er nøgdur ella ikki nøgdur við tilmælið hjá landsstýrismanninum.

– Vit gera tað, sum skipanin áleggur okkum at gera, og til tess at náa hesum máli, hava vit havrannsóknarskipið, Magnus Heinason, sum ger sínar regluligu kanningar, har yvirlitstrolingarnar eru ein týðandi partur av hesum arbeiði. Vit kanna eisini aldursbýtið hjá fiskinunum, og hvussu veiðan hjá skipunum broytist.

Fiskirannsóknarstovan heldur, at veiðitrýstið er ov stórt, og at tað hevur avleiðingar fyri fiskiskapin undir Føroyum, at politisku myndugleikarnir ikki taka neyðugu stigini til tess at minka um trýstið.

## Smáur fiskur

Hjalti í Jákupsstovu vísir á, at ein avleiðing av stóra trýstinum á fiskastovnarnar er, at fiskurin er so smáur.

– Vit síggja, at fiskurin er rættiliga smáfallandi, og hetta er ikki minst galdandi fyri upsan. Ein orsøkin er, at fiskurin sleppur ikki at gerast gamal. Tann stóri fiskurin verður veiddur, og tann smái fiskurin verður eisini tikin, áðrenn hann er vaksin. Við verandi veiðitrýstið hevur fiskurin eftir øllum at døma ongan kjans at veksa.

Spurdur, hvussu tað ber til, at nøgdirnar av smáum fiski eru so stórar, tá ið veiðitrýstið sambært fiskifrøðingum er ov stórt, sigur hann, at hetta kemst av, at vit hava havt góðar árgangir.

– Talið av stórum fiski í havinum er sjálvsagt minni enn av smáum fiski, og tá ið trýstið er ov stórt, minkar talið av tí størra fiskinum uppaftur meira, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Ofta hevur verið ført fram, at fiskidagaskipanin, sum vit fingu fyri átta árum síðan, er sjálvregulerandi á tann hátt, at er nógv til av fiski, verður veiðan størri – og er minni til, verður veiðan minni. Men treytin fyri, at skipanin kann vera sjálvregulerandi er, at veiðitrýstið ikki økist.

– Vit halda, at veiðitrýstið er nógv økt undir fiskidagaskipanini – við nýggjari skipum, bæði á trol- og húkaveiði.

Spurdur, um tað ikki tekniskt ber til at prógva økta veiðitrýstið, sum Fiskirannsóknarstovan vil vera við hevur verið, sigur Hjalti, at tað saktans letur seg gera, men hetta er ikki so einfalt.

– Vit hava ikki orku til at gera hetta, sigur hann.

Hjalti vísir á, at einki stendur í stað, og tað ger veiðitrýstið heldur ikki, tá ið flotin verður effektiviseraður.

– Trolararnir eru vorðnir effektivari, og tað eru línuskipini og útróðrarbátarnir eisini. Vit kunnu siga, at talan er um smáar einstakar effektiviseringar, sum tilsamans gera stóran mun, sigur hann.

## Trolararnir

Í uppskotinum hjá landsstýrismanninum verður mælt til at skerja veiðina hjá lemmatrolarum eftir toski og hýsu.

Vit spurdu Hjalta, hvønn týdning tað hevur havt fyri toska- og hýsustovnin, at partrolarar í størri mun hava roynt eftir toski og hýsu, nú upsaprísurin hevur verið so lágur.

– Sjálvsagt ger alt mun, men her eiga vit at hava í huga, at partorlararnir í fjør ikki fiskaðu ta nøgd av toski og hýsu, sum teir sambært fiskisagaskipanini hava loyvi at fiska, og tí er ikki nógv av siga um hetta, so leingi teir fiska sambært galdandi lóg.

Hjalti er hinvegin ikki so fegin um, at lemmatrolararnir hava tonsakvotur av toski og hýsu á innaru leiðunum, tí fiskidagaskipanin byggir á dagar og ikki á tonsatøl.

Leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni heldur, at niðurskurðurin í dagatalinum á Føroyabanka uppá 10% er alt ov lítil, tí veiðitrýstið á bankanum er tvífaltað seinastu tvey árini.

– Vit mælti til, at veiðitrýstið á bankanum verður tað sama sum fyri tveimum árum síðan, sigur Hjalti í Jákupsstovu at enda.



*- Trolararnir eru vorðnir effektivari, og tað eru línuskipini og útróðrarbátarnir eisini. Vit kunnu siga, at talan er um smáar einstakar effektiviseringar, sum tilsamans gera stóran mun, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*